# Kunngerðablaðið A

2010 Hefti 20

ISSN 0907-905X


Nr. 85

9. juli 2010

## Kunngerð um broyting í kunngerð um fiskiskapin í føroyskum sjógvi við fiskiførum, sum eru skrásett í Føroyum

### § 1

Í kunngerð nr. 117 frá 14. november 2005 um fiskiskapin í føroyskum sjógvi við fiskiførum, sum eru skrásett í Føroyum verða gjørdar hesa broytingar:

1) § 2, 2. og 3. pkt. verða orðað soleiðis:
„Veiðan av undirmátsfiski fyri hvønn túr, má ikki vera meira enn 5% av samlaðu vektini av veiðini fyri túrin. Veiðan av undirmátsmakreli kann tó vera uppí 10% av samlaðu vektini av veiðini fyri túrin.“

2) § 19 verður orðað soleiðis:

*„Sild og gulllaksur*

**§ 19**. Tá sild ella gulllaksur verður veiddur við uppsjóvartroli, mugu meskarnir ikki fara niður um 35 mm.
*Stk. 2.* Í beinleiðis veiði eftir sild ella gulllaksi má samlaða hjáveiðan av fiskasløgunum toskur, hýsa, upsi og kongafiskur ikki vera meiri enn 2% av samlaðu veiðini fyri hvørt hál. Hjáveiða av øðrum fiskasløgum er loyvd.“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 9. juli 2010

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705